# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 28-09-2021
Mál nr.: 21/13455-6

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
(Veiðiloyvi, brúksskylda, leingja gildistíðina á rættindum, flyta ófiskaðar kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2021 til 2022, eigaraviðurskifti í føroyskum deksbátum og tillagingar og fylgibroytingar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, nr. 5 verður orðað soleiðis:
"5) Veiðiloyvi: Tann rættur, ið landsstýrismaðurin veitir eigara av ávísum fiskifari undir føroyskum flaggi at reka vinnuligan fiskiskap við fiskifarinum."

**2.** Í § 2 verður sum nr. 22 sett:
"22) Veiðirættindi: Felagsheiti fyri øll sløg av rættindum at veiða sambært løgtingslógini."

**3.** Í § 5, stk. 1 verður "Veiðiloyvi verður latið eigara av fiskifari til ávíst fiskifar. Treyt fyri at fáa veiðiloyvi er," broytt til: "Veiðiloyvið er treytað av:".

**4.** § 5, stk. 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"1) at eigarin hevur ræðið á veiðirættindum sambært løgtingslógini, og at hesi veiðirættindi eru knýtt at fiskifarinum,".

**5.** § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Um treytirnar í stk. 1, nr. 1 og nr. 3-5 ikki eru loknar, fellur veiðiloyvið burtur. Landsstýrismaðurin kann tó loyva, at viðurskiftini koma í rættlag innan ávísa tíðarfreist og kann áseta nærri treytir fyri virkseminum í tíðarskeiðinum."

**6.** Í § 7, stk. 1 og 2 verður "1. januar 2033" broytt til: "1. januar 2034".

**7.** § 10, stk. 4, 2. pkt. verður strikað.

**8.** Í § 11, stk. 5 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Harumframt kann landsstýrismaðurin, fyri fiskifar millum 5 og 20 tons, sum er smíðað í Føroyum í 1930 ella áðrenn, og sum verður mett at hava serligan mentanarsøguligan týdning fyri Føroyar, geva undantak frá treytini í § 11, stk. 1 um, at eigarin skal vera persónur ella felag."

**9.** § 14 a verður strikað.

**10.** §§ 15 a, 15 b, 15 c og 15 d verða strikaðar.

**11.** Í § 18, stk. 1, nr. 5 verður "§ 22, stk. 4" broytt til: "§ 22, stk. 3".

**12.** § 21, stk. 3 verður strikað.

**13.** § 22, stk. 3 verður strikað.
Stk. 4 verður eftir hetta stk. 3.

**14.** § 28, stk. 1-3 verða orðað soleiðis:
"Veiðiloyvi kann við loyvi frá landsstýrismanninum verða flutt á annað fiskifar við veiðiloyvi ella á fiskifar við ongum veiðiloyvi. Tá veiðiloyvið verður flutt, verða samstundis flutt øll veiðirættindi, fiskifarið hevur rætt til.
*Stk. 2.* Tá veiðiloyvið hjá fiskifari, sum hevur fiskidagar í bólki sambært § 18, stk. 1, nr. 1-4, verður flutt, skal fiskiorkan ikki økjast. Somuleiðis er treyt, at fiskifarið, sum veiðiloyvið verður flutt á, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið galda fyri bólkin.
*Stk. 3.* Tá veiðiloyvið hjá fiskifari, ið hevur veiðirættindi sambært § 22, undantikin fiskiskapur, sum er skipaður við mest loyvdu veiðu og egnum árskvotum, verður flutt, skal fiskiorkan ikki økjast."

**15.** § 30, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

**16.** Í § 30, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Í uppgerð av nýtsluni fiskiárið frammanundan verða íroknaðir fiskidagar keyptir, og frároknaðir fiskidagar seldir. Fiskidagar, avhendir fyri eitt ár í senn sambært stk. 1, verða roknaðir uppí uppgerðina hjá avhendara sum ikki brúktir."

**17.** § 30, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um fiskiorku og mannagongd fyri avhending av fiskidøgum."

**18.** Í § 31, stk. 2 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Í uppgerð av nýtsluni, fiskiárið frammanundan, verða íroknaðar kvotur keyptar, og frároknaðar kvotur seldar. Kvotur, avhendar fyri eitt ár í senn sambært stk. 1, verða roknaðar uppí uppgerðina hjá avhendara sum ikki brúktar."

**19.** Í § 32, stk. 1, 2 og 4, § 33, § 42, og § 50, stk. 4 verður "sambært § 18, stk. 1, nr. 6" broytt til: "sambært § 18, stk. 1, nr. 5".

**20.** § 34, stk. 4, 4. pkt. verður strikað.

**21.** § 34, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Hóast ásetingina í stk. 4 kann landsstýrismaðurin loyva, at meira enn 10% av egnari árskvotu hjá ávísum fiskifari og felags árskvotur av makreli, norðhavssild ella svartkjafti í 2021 kann flytast til at verða fiskað í 2022."

**22.** § 36 verður orðað soleiðis:

"**§ 36.** Veiðiloyvi, sum ikki er brúkt við tí í loyvinum nevnda fiskifari í tvey ár á rað, fellur aftur til landið. Tá veiðiloyvi falla aftur til landið, falla veiðirættindini, knýtt at ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi, eisini aftur til landið.
*Stk. 2.* Hevur fiskifar í einum fiskiári ikki gagnnýtt rættin til egnar fiskidagar ella egnar kvotur við meira enn 30% við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari, fellur munurin millum tað, ið er brúkt, og 30% aftur til landið. Nýtslan verður gjørd upp fyri hvønn fiskiskap á ávísari fiskileið sær, og verður roknað av fiskidøgum ella kvotum, íroknað fiskidagar ella kvotur keyptar, og frároknað fiskidagar ella kvotur seldar, sambært §§ 30 og 31. Veiðirættindi, avhendað fyri eitt ár í senn sambært §§

30 ella 31, verða roknað uppí uppgerðina hjá avhendara sum ikki brúkt.
*Stk. 3*. Brúksskyldan, sambært stk. 2, fevnir ikki um
1) fiskasløgini norðhavssild, makrel og svartkjaft,
2) fiskiloyvi latin útróðrarbátum sambært § 18, stk. 1, nr. 5, og onnur rættindi latin útróðrarbátum undir 15 tons,
3) rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 í gildistíðini sambært § 9, og
4) rættindi, ið eru partur av umbýti sambært § 24.

*Stk. 4.* Í serstøkum førum kann landsstýrismaðurin geva undantak frá ásetingum í stk. 1 og 2."

**23.** § 49, stk. 4, 3. pkt. verður orðað soleiðis:
"Er tilsøgn givin til veiðu eftir ávísum fiskaslagi sambært hesi grein, kann landsstýrismaðurin í tilsagnartíðarskeiðinum, eftir umsókn, taka avgerð um at leggja kvoturnar um til egnar árskvotur, um mett verður, at grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar í loyvinum annars hava verið loknar, og loyvishavarin lýkur vanligu treytirnar ásettar í §§ 11-13."

**24.** Aftan á § 49 verður sett:

"**§ 49 a.** Landsstýrismaðurin kann loyva, at óbrúktar nøgdir av makreli, norðhavssild og svartkjafti, latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1 og 2 í 2021, íroknað nøgdir fluttar frá 2020, kunnu verða fluttar til at verða fiskaðar í 2022.
*Stk. 2.* Flutt kvota, sambært hesi grein, verður ikki roknað sum partur av føroysku kvotuni tað árið, ið kvotan er flutt til."

**25.** Í § 64, stk. 1, nr. 1 verður "§ 5, stk. 2," strikað.

**26.** Í § 64, stk. 1, nr. 1 verður aftan á § 21, stk. 1: "og 3" strikað.

**27.** Í § 64, stk. 2 verður "§ 22, stk. 1, 2 og 4" broytt til: "§ 22, stk. 1-3".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kungjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið verður lagt fram, tí tørvur er á at tillaga og broyta lógarásetingar í sambandi við tær skipanir, sum eftir lógini fáa virknað 1. januar 2022. Talan er um reglurnar um brúksskyldu og reglurnar um veiðiloyvi.

Harafturat er í lógini álagt landsstýrismanninum á hvørjum ári at leggja fram uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári.

Somuleiðis er ætlanin at fáa heimild at flyta óbrúktar nøgdir av kvotum í 2021 til at verða fiskaðar í 2022. Talan er bæði um vanligar kvotur og kvotur, sum eru latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Lógaruppskotið verður eisini lagt fram fyri at gera serligar ásetingar um eigaraviðurskifti í sambandi við gamlar føroyskar deksbátar (sluppungar), sum hava mentanarsøguligan týdning.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Lógin um sjófeingi kom í gildi 1. januar 2020. Summar ásetingar og skipanir fáa tó ikki virknað fyrr enn 1. januar 2022.

Eftir galdandi lóg skulu rættindahavarar í seinasta lagi 1. januar 2022 hava knýtt síni veiðirættindi at ávísum fiskifari. Tá er tvey ára tillagingartíðin runnin, og skipan við veiðiloyvum verður sett í verk. Tørvur er á at tillaga reglurnar um veiðiloyvi.

Við ársskiftið fær brúksskyldan á veiðirættindum virknað. Hetta merkir, at tá veiðirættindi skulu útskrivast fyri fiskiárið 2023, skal myndugleikin kanna eftir, um rættindahavarar hava hildið ásettu brúksskylduna. Brúk er fyri at stilla regluverkið fyri brúksskyldu.

Í galdandi lóg er ikki heimild at flyta óbrúktar kvotur, settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021, til 2022. Somuleiðis er ásett, at avlopsnøgdir, sum eru fluttar frá 2020 til 2021, bert kunnu brúkast í 2021 og falla hareftir burtur. Mett verður, nú tað er liðið so nógv út við at útluta kvoturnar til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021, at tað er lítið sum bendir á, at útlutaðu kvoturnar fara at verða fiskaðar í 2021. Fyri at hava møguleika at flyta óbrúktar kvotur í 2021 til 2022, er tørvur á at tillaga reglurnar á økinum.

Eftir galdandi lóg skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári.

Tørvur er harumframt at nágreina og dagføra ásetingar ymsastaðni í lógartekstinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at broyta og tillaga sjófeingislógina soleiðis, at tær skipanir, sum fáa virknað 1. januar 2022, eru gjøgnumskygdar og greiðar at umsita. Endamálið er eisini at leingja gildistíðina á veiðirættindum við einum ári. Somuleiðis er lagt upp til at broyta ásetingarnar um at flyta avlop av kvotum, latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, millum ár fyri at tryggja, at latnar kvotur verða gagnnýttar. Miðað er harumframt eftir at gera tekniskar broytingar og stillingar, so at lógarkarmurin er greiðari.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lógaruppskotið fevnir um hesar broytingar í sjófeingislógini:

- *Brúksskylda á veiðirættindi*
  Yvirskipaða endamálið við brúksskylduni er at tryggja, at tey brúksrættindi, landið letur, verða brúkt. Skotið verður upp at gera tvær høvuðsbroytingar í reglunum um brúksskyldu á veiðirættindum:

  Onnur er at broyta ásetingina um, at veiðiloyvi *og* fiskiloyvi, sum ikki hava verið brúkt í tvey ár á rað, falla aftur til landið, soleiðis at ásetingin bert er galdandi fyri veiðiloyvið. Broytingin ber millum annað í sær, at tvey ára brúksskyldan ikki er á fiskiloyvi, sum gevur rætt til at fiska av felagskvotu. Nógvir av teimum veiðimøguleikum, sum eru skipaðir við øðrum enn eginrættindum, og sum liggja óbrúktir ár um ár, verða neyvan aktiveraðir við eini brúksskyldu. Orsøkin, til at summi tøk veiðirættindi liggja óbrúkt ár um ár, er sum oftast, at tað loysir seg ikki at fiska, ella at onnur veiðirættindi kasta meira av sær.

  Hin høvuðsbroytingin er, at fiskasløgini makrelur, svartkjaftur og norðhavssild verða undantikin brúksskylduni, eins og tey eru undantikin brúksskylduni (60%-regluni) í sambandi við avhending av kvotum.

  Við hesum báðum broytingum kemur brúksskyldan at fevna um hesi veiðirættindi:

  - Fiskidagar í bólki 2, 3, 4 og 4 T í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi
  - Kvotur í beinleiðis fiskiskapi eftir gulllaksi í føroyskum sjógvi
  - Kvotur í fiskiskapi eftir heystgýtandi sild í føroyskum sjógvi
  - Botnfiskakvotur í Eysturgrønlandi – toskur, svartkalvi og brosma
  - Botnfiskakvotur í íslendskum sjógvi
  - Lodnukvotur í íslendskum sjógvi
  - Botnfiskakvotur í norskum sjógvi norðan fyri 62°N
  - Botnfiskakvotur í russiskum sjógvi í Barentshavinum
  - Botnfiskakvotur í verndarøkinum við Svalbard
  - Toskakvotur á Flemish Cap (NAFO-øki 3M)
  - Kongafiskakvotur í Irmingerhavinum

  Samanumtikið verður ikki mett, at lógarbroytingarnar nerva endamálið og politisku ætlanina við brúksskylduni.

- *Avlopsnøgdir av vanligum kvotum í 2021 flytast til 2022*
  Ein onnur nýskipan er, at heimilað verður landsstýrismanninum at flyta størri nøgdir enn 10% av egnari árskvotu av makreli, norðhavssild ella svartkjafti hjá ávísum fiskifari og felags árskvotur av somu fiskasløgum uttan treyt um serligar umstøður.

- *Avlopsnøgdir av kvotum til vinnuligar royndar og verkætlanir í 2021 flytast til 2022*
  Í galdandi lóg er ikki heimild at flyta óbrúktar kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti, settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021, til 2022. Somuleiðis ásetir lógin, at avlopsnøgdir, sum eru fluttar frá 2020 til 2021, bert kunnu brúkast í 2021 og falla hareftir burtur. Tað er liðið somikið út á árið at avgreiða kvoturnar í 2021, at hóast kvoturnar eru útlutaðar, fara tær neyvan at verða fullnýttar í 2021. Fyri at tryggja, at

tað, ið er latið til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021, verður fiskað, er skotið upp, at heimild verður at flyta avlop í 2021 til at verða fiskað í 2022, eisini tær nøgdir, ið stava frá kvotum fluttar frá 2020 til 2021.

- *Veiðiloyvi*
  Frá 1. januar 2022 skulu veiðirættindi vera knýtt at ávísum fiskifari, sum fær veiðiloyvi. Í galdandi lóg eru treytir fyri at *fáa* veiðiloyvi. Hesar ásetingar eru mest orðaðar til tillagingartíðina fram til 1. januar 2022. Skotið er upp at umorða hesar ásetingar, so tær eftir 1. januar 2022 eisini eru treytir fyri at *hava* veiðiloyvi. Harumframt verða reglurnar um at flyta veiðiloyvi millum fiskifør gjørdar neyvari og greiðari. Talan er ikki um innihaldsligar broytingar.

- *Gildistíð á rættindum*
  Landsstýrismaðurin skal á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið um, at gildistíðin á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 skal leingjast við einum ári. Skotið verður upp at leingja gildistíðina, so at loyvini eru galdandi til 1. januar 2034.

- *Sluppungar*
  Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at eigarin av fiskifarinum er persónur ella felag, sum er heimahoyrandi í Føroyum. Felag er at skilja sum partafelag ella smápartafelag. Skotið verður upp, at undantak kann gevast frá treytunum um eigaraviðurskifti fyri eldri deksbátar, smíðaðir í Føroyum, so møguleiki er hjá eigarunum at skipa seg í annað enn partafelag ella smápartafelag. Hesir deksbátar hava oftani mentanarsøguligan týdning, og hildið verður, at tey, ið ganga saman um at varðveita slíkar bátar, eiga at hava møguleika at skipa eigaraviðurskiftini í t.d. ein grunn.

- *Umlegging av ískoytiskvotum o.a.*
  Skotið verður upp at broyta lógina soleiðis, at í *tíðarskeiðinum* tilsøgn um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, kvotur í sambandi við skipakeyp og kvotur til at styrkja um kvotugrundarlagið hjá fiskifari er galdandi, kann landsstýrismaðurin fyrisitingarliga gera av, at tillutað kvota kann verða løgd um til egnar árskvotur, um mett verður, at grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar annars hava verið hildnar. Verandi orðing kann lesast sum, at henda umlegging ikki kann gerast, fyrr enn tilsagnartíðarskeiðið er runnið.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð sent til ummælis hjá .............
..............................
...................................

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Fyri landið verður mett, at tær broytingar, ið uppskotið ber í sær, stuðla undir, at lógin verður greiðari og lættari at umsita.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Broytingarnar í reglunum um brúksskyldu ávirka karmarnar hjá vinnuni. Heimildin, sum loyvir at flyta óbrúktar nøgdir av tí, ið er latið til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021 til 2022, verður mett at gagna teimum, sum hava fingið lut í hesum kvotum. Hetta er eisini galdandi fyri heimildina at flyta meira enn 10% av avlopi av vanligum kvotum í 2021 til 2022. Annars verður ikki mett, at broytingarnar í sjálvum sær hava beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Broytingar, hvørs endamál er at gera regluverkið neyvari og greiðari, gagna vanliga eisini vinnuni.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á teimum økjum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, harundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at hetta uppskotið elvir til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn ella kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

**Til nr. 1**
*§ 2, nr. 5*
Allýsingin av veiðiloyvi verður umorðað, so hon er greiðari.

Veiðiloyvið er eitt slag av góðkenning av ávísum fiskifari, sum eigarin fær til at reka vinnuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi. Sama fiskifar kann bert hava eitt veiðiloyvi, men kann hava fleiri fiskiloyvi. Veiðiloyvi verður ikki givið til ávísan fiskiskap. Tað verður gjørt við fiskiloyvinum, sum ásetir ítøkiligu veiðirættindini hjá einstaka fiskifarinum tað árið, og er avmarkað til tað árið.

Skipan við veiðiloyvum verður sett í verk frá 1. januar 2022. Við lógini um fyrisiting av sjófeingi (2018-2019) vóru fiskirættindi loyst frá ávísa fiskifarinum. Rættindahavarin kundi tá í prinsippinum velja, hvat fyri fiskifar hann brúkti síni veiðirættindi við. Hetta varð broytt

við galdandi sjófeingislóg. Veiðirættindi skulu aftur knýtast at ávísum fiskifari. Ein tillagingartíð varð tó gjørd í lógini, men í seinasta lagi 1. januar 2022 skulu rættindahavarar hava knýtt síni rættindi at ávísum fiskifari, sum fær veiðiloyvi.

Veiðiloyvi er nevnt fleiristaðni í lógini. Eftir § 4, stk.1 í lógini er ikki loyvt at reka vinnuligan fiskiskap uttan veiðiloyvi. Bólkur 5 er tó undantikin kravinum um veiðiloyvi fyri at fáa fiskiloyvi.

Í lógini eru treytir fyri at fáa og at hava veiðiloyvi (§ 5, stk. 1). Fyri at hava veiðiloyvi, skulu veiðirættindi (t.d. kvotur ella fiskidagar) vera knýtt at fiskifarinum. Sostatt ber ikki til hava tóm veiðiloyvi. Eigarin av fiskifarinum skal lúka treytirnar um eigaraviðurskifti í §§ 11 og 12. Fiskifarið skal vera skrásett í skipaskránni, skal hava siglingarloyvi, og skal ikki vera skrásett at hava verið partur í ólógligum, óskipaðum og ófráboðaðum fiskiskapi.

Eftir galdandi reglum kunnu egnir fiskidagar ella egnar kvotur avhendast millum fiskifør við veiðiloyvi (§§ 30 og 31). Í lógini eru eisini reglur um at flyta veiðiloyvi saman við øllum veiðirættindum millum fiskifør (§ 28).

Veiðiloyvi verður latið eigara av ávísum fiskifari til tað ávísa fiskifarið. Verður fiskifarið selt, í tvingsilssølu ella vanligari sølu, fær nýggi eigarin veiðiloyvið, um hann lýkur treytirnar fyri at hava veiðiloyvi (§ 28, stk. 5).

**Til nr. 2**
*§ 2, nr. 22*
Hetta er nýggj áseting, sum allýsir "veiðirættindi". Hugtakið er brúkt nógvastaðni í lógini, og skotið er tí upp, at allýst verður nærri, hvat tað fevnir um. "Veiðirættindi" er eitt felagsheiti fyri øll rættindi og rættindasløg, sum verða latin í fiskiloyvið, t.e. rættindi til egnar árskvotur, egnar fiskidagar, rætt at fiska av felagskvotu o.s.fr. Hugtakið fevnir sostatt ikki um veiðiloyvið.

**Til nr. 3 og 4**
*§ 5, stk. 1*
Verandi treytir fyri veiðiloyvi eru mest orðaðar til tvey ára tillagingartíðina fram til 1. januar 2022, tá øll veiðirættindi skulu vera knýtt at ávísum fiskifari við veiðiloyvi. Tað snýr seg um treytir fyri at *fáa* veiðiloyvi til tað ávísa fiskifarið, ið rættindahavari velur at knýta síni veiðirættindi at.

Skotið verður upp at umorða og tillaga ásetingina, so at hon eftir 1. januar 2022 eisini er um treytir fyri at *hava* veiðiloyvi. Innihaldið í treytunum, ið eru settar eigara og fiskifari, er óbroytt.

Viðmerkjast skal, at eftir § 49 í lógini fær fiskifar, ið fær játtað kvotu til skipakeyp, samstundis játtað fyribils veiðiloyvi, sum seinni kann gerast endaligt veiðiloyvi. Tí kunnu veiðiloyvi seinni koma afturat teimum, ið eru 1. januar 2022.

**Til nr. 5**
*§ 5, stk. 2*
Skotið verður upp at umorða hesa greinina, uttan at broyta innihaldið. Eins og í galdandi lóg verður ásett, at um tú ikki lýkur treytirnar fyri at hava veiðiloyvi, so dettur tað burtur. Landsstýrismaðurin kann tó geva rættindahavaranum eitt skotbrá at fáa viðurskiftini í rættlag.

Mett verður ikki, at tað er skynsamt at áseta í lógini neyvt, hvør freistin skal vera, tí tað veldst nógv um umstøðurnar, og hvørjar treytirnar eru, sum ikki eru loknar. Hugsast kann t.d., at fiskifar missir siglingarloyvið, sum sjóvinnumyndugleikin varðar av. Tá kann myndugleikin geva eigaranum eina freist fyri at varðveita veiðiloyvið, inntil viðurskiftini við siglingarloyvinum koma í rættlag. Mál um broytingar í eigaraviðurskiftunum ella miðsavningartreytunum verða avgreidd eftir mannagongdini í §§ 11, 12 ella 13, har møguleiki er at geva eina tíðarfreist at fáa viðurskiftini í rættlag.

**Til nr. 6**
*§ 7, stk. 1 og 2*
Sambært § 7, stk. 3 skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja fram uppskot fyri Løgtingið at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5 við einum ári. Her er skotið upp at leingja gildistíðina til 1. januar 2034. Veiðirættindi hava somu gildistíð sum veiðiloyvið.

**Til nr. 7**
*§ 10, stk. 4*
Hendan ásetingin hevur ikki týdning longur, men datt niðurímillum, tá greinin varð broytt, sí løgtingsmál 100/2020.

**Til nr. 8**
*§ 11, stk. 5*
Í galdandi lóg er ásett, at eigarin av fiskifarinum er persónur ella felag, og at felag er at skilja sum partafelag ella smápartafelag.

Skotið verður upp, at heimild verður at geva undantak frá treytunum um eigaraviðurskifti fyri eldri føroyskar deksbátar, sum hava rætt at reka vinnuligan fiskiskap, so at hesir eigarar kunnu skipa seg í annað enn partafelag ella smápartafelag. Hesir deksbátar hava mentanarsøguligan týdning, og hildið verður, at tey, ið ganga saman um at varðveita slíkar bátar, skulu kunna skipa eigaraviðurskiftini í t.d. ein grunn. Undantakið er galdandi fyri deksbátar millum 5 og 20 tons, og sum eru smíðaðir í Føroyum fyri 1930.

**Til nr. 9**
*§ 14 a*
Hendan greinin verður strikað við gildi frá 1. januar 2022. Gerast skal tó vart við, at í nýggjari grein 49 a í hesum uppskotinum er lagt upp til, at nøgdir av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum vórðu fluttar frá 2020 til 2021, men ikki brúktar í 2021, ikki detta burtur, sum galdandi § 14 a, stk. 3 sigur, men kunnu ístaðin flytast til 2022. Víst verður til viðmerkingarnar til § 49 a, broyting nr. 23.

**Til nr. 10**
*§ 15 a*
Hendan greinin hevði bert týdning í 2020 og verður tí strikað.

*§ 15 b*
Hendan greinin verður strikað við gildi frá 1. januar 2022, men í nýggjari grein 49 a í uppskotinum er lagt upp til at broyta verandi § 15, stk. 3 soleiðis, at nøgdir av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum vórðu fluttar frá 2020, men ikki brúktar í 2021, ikki detta burtur, men ístaðin kunnu flytast til 2022. Ásetingin í verandi stk. 4 um, at flutt kvota ikki verður roknað uppí tøku føroysku kvotuna tað árið, ið hon er flutt til, er við í nýggju grein 49 a. (sí viðmerkingar til broyting nr. 23).

*§§ 15 c og 15 d*
Hesar greinir vóru bert galdandi í 2020 og verða tí strikaðar.

**Til nr. 11**
*§ 18, stk. 1, nr. 5*
Fylgibroyting av broyting nr. 12, har § 21, stk. 3 verður strikað.

**Til nr. 12**
*§ 21, stk. 3*
Henda áseting um fiskiorku hevði bert týdning í tillagingartíðini fram til 31. desember 2021. Tí verður hon strikað.

**Til nr. 13**
*§ 22, stk. 3*
Henda áseting áleggur landsstýrismanninum at lata makrelkvotu til línuskip og garnaskip. Í 2020 og 2021 hava tey, sum varða av fiskiførum í hesum bólkum, fingið makrelkvotu. Tey hava verið partur av býtinum í makrelkunngerðini og hava verið undir somu treytum sum øll onnur, ið hava egnar árskvotur av makreli, sum ikki eru beinleiðis álagdar við lóg.

Skotið verður upp at strika hesa áseting. Broytingin førir ikki við sær, at makrelkvotan hjá hesum báðum skipabólkum dettur burtur, ella at tann, ið varðar av línuskipi ella garnaskipi, missir rættin at fiska makrel. Hesir rættindahavarar eru inni í skipanini á jøvnum føti við øll onnur, ið hava atgongd at fiska makrel og koma eisini frameftir at vera partur í býtinum.

**Til nr. 14**
*§ 28, stk.1-3*
Hesar greinir snúgva seg um reglur fyri at flyta veiðiloyvi og harvið øll veiðirættindi millum fiskifør. Skotið er upp at umskipa og umorða tey fyrstu trý stykkini í greinini, so tey eru greiðari, nú skipanin við veiðiloyvum verður sett í verk. Innihaldið í galdandi reglum er varðveitt.

Stk. 1. Loyvt er at flyta eitt ella fleiri veiðiloyvi á fiskifar við ongum veiðiloyvi. Her kann talan vera um, at rættindahavari ger av at skifta fiskifarið út og at flyta veiðiloyvið saman við øllum veiðirættindum á nýggja skipið. Veiðiloyvið kann eisini verða flutt á fiskifar við ongum veiðiloyvi, sum annar persónur ella felag eigur. Tá fleiri enn eitt veiðiloyvi verða flutt á skip við ongum veiðiloyvi, verður tað bert tað eina veiðiloyvið, sum verður eftir í skipanini; hini detta burtur. Fiskifarið, ið kemur inn, skal lúka treytirnar í § 5 í lógini um, at skipið skal hava siglingarloyvi, skal vera skrásett í skipaskránni og skal ikki vera skrásett at hava verið partur í ólógligum, óskipaðum og ófráboðaðum fiskiskapi.

Somuleiðis ber til at flyta veiðiloyvi á fiskifar, sum frammanundan hevur veiðiloyvi. Talan kann vera um, at tvey veiðiloyvi á fiskifari við sama eigara verða løgd saman, t.d. við tí í hyggju at kunna gagnnýta tøk veiðirættindi skynsamari við minni veiðiorku. Veiðiloyvi kann eisini verða lagt saman við veiðiloyvi á fiskifari hjá øðrum eigara. Tá eitt ella fleiri veiðiloyvi verða løgd saman, verður bert eitt veiðiloyvi eftir í skipanini. Hini detta burtur.

Stk. 2. Her eru ásettar serligar treytir í sambandi við at flyta veiðiloyvið hjá fiskifari, ið hevur fiskidagar í fiskidagaskipanini í føroyskum sjógvi. Tá veiðiloyvi við fiskidøgum verður flutt á annað fiskifar, eru tvær treytir. Onnur er, at fiskiorkan ikki økist. Skal dagaskipanin stuðla

undir góða stovnsrøkt, er umráðandi, at ein hevur tamarhald á fiskiorkuni, tá veiðiloyvi og fiskidagar verða flutt á effektivari skip. Lógin sjálv ásetir ikki, hvussu fiskiorkan verður ásett og roknað. Hetta hevur landsstýrismaðurin heimild at gera sambært stk. 4.

Hin treytin, fyri at loyva flyting av veiðiloyvinum, er, at fiskifarið, sum veiðiloyvið verður flutt á, er innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið galda fyri bólkin sambært uppbýtinum í § 18 í lógini.

Viðmerkjast skal, at skipanin við veiðiloyvum, sum fær gildi 1. januar 2022, er ikki heilt tann sama, sum var undir gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap. Hetta er eisini galdandi fyri reglurnar um at flyta veiðiloyvi og fiskiorku í tí sambandi. Nú ber til dømis til at flyta veiðiloyvið hjá fiskifari, ið hevur fiskidagar í ávísum bólki, uttan at fiskifarið, veiðiloyvið verður flutt á, hevur neyvt sama ella minni metingarvirði fyri fiskiorku. Fiskifarið, sum veiðiloyvið verður flutt á, kann til dømis vera størri, men skal vera undir ovara marki fyri stødd ella framtøkumegi, ið er ásett fyri bólkin. Fyri at leggja upp fyri, at fiskifør hava ymisk veiðievni, verða fiskidagar at flyta á nýggja fiskifarið umroknaðir eftir reglunum um avhending av fiskidøgum.

Hetta kann lýsast nærri við einum hugsaðum dømi: Veiðiloyvið hjá trolara í bólki 2 skal flytast á annan trolara við ongum veiðiloyvi. Fyri at hetta skal kunna gerast, eru tvinnar treytir: Onnur er, at trolarin, veiðiloyvið verður flutt á, hevur framtøkumegi (HK), sum er millum 501 og 3000 HK. Hin treytin er, at fiskiorkan ikki skal gerast størri.

Nýggi trolarin er undir ovara markinum fyri framtøkumegi í bólki 2, men er eitt sindur størri enn gamli trolarin. Siga vit, at talan er um at flyta 200 dagar frá einum trolara við einum metingarvirði fyri fiskiorku upp á LxBxD x HK/1000 = 970 til at brúka við einum trolara, sum hevur LxDxB x HK/1000 = 1650, so verða dagarnir at flyta umroknaðir eftir reglunum um avhending av fiskidøgum fyri at leggja upp fyri fiskiorkuni: 200 x 0,83 = 166 fiskidagar.

Stk. 3. Her er ásett, at tá veiðiloyvið hjá fiskifari, ið hevur veiðirættindi í fiskiskapi í føroyskum sjógvi, sum er skipaður við heimild í § 22, t.e. uttan fyri fiskidagaskipanina, verður flutt, skal fiskiorkan ikki økjast. Fiskiskapur, sum er skipaður við mest loyvdu veiðu og egnum árskvotum, er undantikin. Dømi um fiskiskap, sum kemur undir hesa lógargrein, er veiða við gørnum eftir havtasku og svartkalva, sum í løtuni hvørki er avmarkaður við fiskidøgum ella kvotum. Her hevur fiskiorkan verið ásett sum tal á gørnum. Garnakunngerðin avmarkar, hvussu nógv gørn hvørt skipið kann hava standandi í senn.

**Til nr. 15**
*§ 30, stk. 1, 2. pkt.*
Orðingin um, at tað ikki er loyvt at avhenda fiskidagar millum bólkarnar í fiskidagaskipanini, verður strikað. Hetta fær ongar avleiðingar og broytir einki í skipanini, tí sambært 3. pkt. í hesi grein skal fiskifarið, sum dagar verða avhendir til, vera innan fyri tey mørk fyri stødd ella framtøkumegi, ið skilmarka bólkin. Nevnast kann eisini, at í kunngerðini um fiskidagar í føroyskum sjógvi er ásett, at fiskidagarnir, tillutaðir hvørjum bólki, bert kunnu nýtast til fiskiskap við fiskifari, ið er innan fyri ta stødd ella ta framtøkumegi, ið er ásett fyri hvønn bólkin og við tí reiðskapi, ið er tilskilað fyri bólkin.

**Til nr. 16**
*§ 30, stk. 2*

Hendan greinin ásetir, at fyri at avhenda fiskidagar skulu 60% av døgunum vera brúktir fiskiárið frammanundan. Sambært § 73, stk. 2 kemur hon í gildi 1. januar 2022, samstundis sum freist er at knýta fiskidagar at ávísum fiskifari. Skotið er upp at skoyta eina nýggja orðing uppí, sum sigur, hvussu nýtslan í sambandi við 60%-treytina verður gjørd upp. Nýggja ásetingin sigur, at í uppgerð av nýtsluni, fiskiárið frammanundan, verða íroknaðir fiskidagar keyptir, og frároknaðir fiskidagar seldir. Fiskidagar, avhendir fyri eitt ár í senn, verða roknaðir uppí uppgerðina hjá avhendara sum ikki brúktir.

Dømi I: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári fingið tillutað 100 fiskidagar. 25 dagar eru avhendir øðrum *endaliga*. Eftir eru 75 fiskidagar, og skipið gagnnýtir 50 dagar. Gagnnýtslan er 66%, og brúksskyldan er lokin. Eigarin kann avhenda rættindi árið eftir.

Dømi II: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári fingið tillutað 100 fiskidagar. 25 dagar eru avhendir øðrum fyri *eitt ár í senn*. Brúksskyldan verður gjørd upp við støði í 100 døgum. Skipið er til fiskiskap í 50 dagar, so gagnnýtt eru 50%. Brúksskyldan, í mun til avhending, er sostatt ikki lokin, og eigarin kann ikki avhenda fiskidagar árið eftir.

**Til nr. 17**
*§ 30, stk. 4*
Henda broyting ber í sær, at verandi heimild at gera reglur um fiskiorku verður umorðað nakað, uttan at hetta ávirkar innihaldið.

**Til nr. 18**
*§ 31, stk. 2*
Hendan greinin, sum ásetir, at fyri at avhenda egnan kvotupart ella egna árskvotu, skulu í mista lagi 60% av kvotuni av fiskaslagnum vera brúkt fiskiárið frammanundan, kemur í gildi 1. januar 2022, samstundis sum freist er at knýta fiskidagar at ávísum fiskifari. Skotið er upp at skoyta eina nýggja orðing uppí, sum sigur, hvussu nýtslan í sambandi við 60%-treytina verður gjørd upp. Ásett verður, at í uppgerð av nýtsluni, fiskiárið frammanundan, verða íroknaðar kvotur keyptar, og frároknaðar kvotur seldar. Kvotur, avhendar fyri eitt ár í senn, verða roknaðar uppí uppgerðina hjá avhendara sum ikki brúktar.

Dømi I: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári rætt til egna árskvotu av heystgýtandi sild upp á 1.200 tons. Hann fiskar 1.000 tons (83%). Brúksskyldan, í mun til avhending, er lokin, og eigarin kann árið eftir avhenda heystgýtandi sild sambært § 31.

Dømi II: Eigari av fiskifari hevur í 2023 rætt til egna árskvotu av heystgýtandi sild upp á 1.200 tons. 500 tons verða avhendað øðrum fyri 1 ár í senn. Avhendingin kann fara fram, tí eigarin hevur brúkt meira enn 60% av tillutaðu kvotuni av heystgýtandi sild í 2022. Skipið fiskar 500 tons í 2023. Brúksskyldan verður gjørd upp í mun til 1.200 tons, so gagnnýtt eru góð 42%. Eigarin av skipinum, sum avhendar í 2023, kann tí ikki avhenda heystgýtandi sild til annað fiskifar í 2024.

**Til nr. 19**
*§ 32, stk. 1 og 2, § 33, § 42 og § 50, stk. 1 og 4.*
Her er talan um at rætta tilvísingina til bólk 5 í § 18, stk. 1. Hetta er dottið niðurímillum, tá § 18 varð broytt (løgtingsmál 056/2020). Rætta tilvísingin skal vera nr. 5 og ikki nr. 6.

**Til nr. 20**
*§ 34, stk. 4, 3. pkt.*

Hendan ásetingin hevði bert týdning í fiskiárinum 2020, og skotið verður upp at strika hana.

**Til nr. 21**
Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at flyta størri nøgdir enn 10% av makreli, norðhavssild ella svartkjafti frá 2021 til at verða fiskað í 2022, t.v.s. uttan treyt um serligar umstøður í tí einstaka førinum. Talan er um rættindi hjá ávísum fiskifari við egnari árskvotu, ella sum fiskar av felags árskvotu. Tá ið kvota verður flutt millum ár, verður hon ikki roknað sum partur av kvotuni hjá ávísa fiskifarinum í tí árinum, sum hon verður flutt til. Hetta verður ofta ásett í kunngerð, men mett verður, at tað eisini kann standa í lógini. Hetta hevur serliga týdning fyri grundarlagið, tá ið flytast skal frá 2022 til 2023, soleiðis at flutta kvotan tá ikki gerst partur av tí grundarlagnum.

**Til nr. 22**
*§ 36*
Brúksskyldan í hesi lógargrein fær virknað 1. januar 2022 (sí § 73, stk. 2). Hetta merkir, at tá veiðirættindi skulu útskrivast fyri fiskiárið 2023, skal myndugleikin kanna eftir, um rættindahavarar hava hildið ásettu brúksskylduna.

Brúksskyldan í galdandi lóg er í tveimum: 1) Um veiðiloyvið og fiskiloyvið als ikki eru brúkt í tvey ár á rað, fellur rætturin at reka vinnuligan fiskiskap aftur til landið. 2) Um egnir fiskidagar ella egin árskvota ikki er brúkt við meira enn 30%, fellur munurin millum tað, sum er brúkt, og 30% aftur til landið.

Við hesum uppskotinum verða ásetingarnar um brúksskyldu broyttar og umskipaðar.

Stk. 1. Skotið er upp at broyta ásetingina um, at veiðiloyvi og fiskiloyvi, sum ikki hava verið brúkt í tvey ár á rað, falla aftur til landið, soleiðis at brúksskyldan bert er galdandi fyri veiðiloyvið. Broytingin ber millum annað í sær, at tvey ára brúksskyldan ikki er á sjálvt fiskiloyvið í fiskiskapi, sum er skipaður við øðrum enn egnum kvotum ella egnum fiskidøgum. Í fiskiskapi, sum er skipaður við øðrum enn egnum rættindum, ber ofta illa til at leggja ábyrgdina fyri vantandi brúk og skyldu at brúka á einstakan rættindahavara, t.d. har skipanin er felagskvota.

Ásetingin merkir, at um fiskifarið als ikki hevur brúkt sín rætt at reka vinnuligan fiskiskap í tvey ár á rað, fellur rætturin (veiðiloyvið) aftur til landið. Tað vil siga, at er fiskifarið ikki skrásett at hava avreitt veiðu av teimum veiðirættindum, ið eru knýtt at skipinum, fellur rætturin til veiðiloyvið og øll fiskiloyvi aftur til landið.

Stk. 2. Henda broyting er í innihaldi óbroytt, men er umorðað fyri at gera hana greiðari og neyvari, eins og stk. 4 í galdandi lóg er sett inn í hetta stykkið. Ásett er, at hevur tú ikki brúkt tínar egnu fiskidagar ella tína egnu árskvotu við meira enn 30%, fellur munurin millum tað, ið er brúkt, og 30% aftur til landið.

Nýtslan verður gjørd upp fyri hvønn fiskiskap á ávísari leið sær. Hetta merkir til dømis, at fiskiskapur eftir botnfiski í Barentshavinum er ein eind, sum fevnir um útlutað veiðirættindi til botnfisk í russiskum sjógvi, norskum sjógvi og við Svalbard. Uppgerðin verður sostatt ikki gjørd fyri hvørt fiskaslag í kvoturættindum sær, men fyri allan botnfisk í Barentshavinum. Sama grundregla verður fyri botnfisk í Íslandi, botnfisk í Eysturgrønlandi og tosk á Flemish Cap. Uppgerðin er fyri allan botnfisk í hvørjum geografiskum øki sær.

Dømi I: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári rætt til egna árskvotu av botnfiski í Barentshavinum upp á 1.200 tons. Hann fiskar 320 tons (27%). Kvotan skal sostatt skerjast við 3% árið eftir (30%-27%). Er kvotan t.d. 1.100 tons fiskiárið eftir, so ger brúksskyldan, at kvotan skal skerjast við 33 tonsum, samsvarandi 3% árið eftir.

Dømi II: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári fingið tillutað 100 fiskidagar. Skipið brúkar 25 dagar, so gagnnýtt eru 25%. Fiskidagarnir hjá hesum fiskifari skulu tí, fiskiárið eftir, skerjast við 5% (t.e. 30% -25%). Hevur fiskifarið rætt til 100 dagar fiskiárið eftir, fær fiskifarið í fiskiloyvið tó bert tillutað 95 dagar (t.e. 100-(5% av 100)) fiskiárið eftir, tí fimm dagar falla fyri brúksskylduni og aftur til landið.

Í uppgerðini verða keyptar kvotur ella fiskidagar íroknað, og seldar kvotur ella fiskidagar roknað frá. Ásett er, at tá veiðirættindi verða avhendað fyri eitt ár í senn, verður avhenda nøgdin roknað uppí nýtsluna hjá avhendara og verður roknað sum óbrúkt av avhendara. Tað, sum sambært uppgerðini møguliga fellur aftur til landið, verður tikið av nøgdini ella fiskidøgunum hjá avhendara árið eftir.

Dømi I: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári fingið tillutað 100 fiskidagar. 25 dagar eru avhendir øðrum endaliga. Eftir eru 75 fiskidagar, og skipið gagnnýtir 25 dagar. Gagnnýtslan er 33%, og brúksskyldan er lokin.

Dømi II: Eigari av fiskifari hevur í einum fiskiári fingið tillutað 100 fiskidagar. 25 dagar eru avhendir øðrum fyri eitt ár í senn. Brúksskyldan verður gjørd upp við støði í 100 døgum. Skipið er til fiskiskap í 25 dagar, so gagnnýtt eru 25%. Fiskidagarnir hjá hesum fiskifari skulu tí, fiskiárið eftir, skerjast við 5%.

Stk. 3. Hendan greinin ásetir, hvat er undantikið brúksskylduni. Broytingin er, at fiskasløgini norðhavssild, makrelur og svartkjaftur verða undantikin generellu brúksskylduni. Hesi fiskasløg eru, sum er, undantikin regluni um, at fyri at avhenda egnan kvotupart ella egna árskvotu er treyt, at í minsta lagi 60% av tillutaðu kvotuni av fiskaslagnum, ið verður avhendað, eru fiskað fiskiárið frammanundan við tí í fiskiloyvinum nevnda fiskifari. Annars eru undantøkini í verandi lóg óbroytt. Hetta eru rættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons, bæði í bólki 5 í fiskidagaskipanini og eitt nú egnar árskvotur av hummara. Somuleiðis fevnir undantakið um rættindi keyp á uppboði í 2018 og 2019 og veiðirættindi, ið eru partur av kvotuumbýti við eigarar av fiskifari undir fremmandum flaggi (§ 24 í lógini), sonevnd kvotu-transfers.

Stk. 4. Hendan heimildin er í galdandi lóg, men verður við hesum uppskotinum umskipað og flutt í annað stk. Landsstýrismaðurin kann, enn sum áður, í serstøkum førum geva undantak frá brúksskylduni. Landsstýrismaðurin kann geva undantak, tá heilt serligar umstøður gera, at fiskifar ikki fær gagnnýtt síni rættindi, t.d. um fiskifar er fyri óhappi og fær brek, ið ger, at fiskifarið má liggja í longri tíð. Talan skal vera um umstøður, sum eigarin av fiskifarinum ikki sjálvur hevur ræðið á ella kundi lagt upp fyri við skynsomum rakstri.

**Til nr. 23**
*§ 49, stk. 4, 3. pkt.*
Hendan ásetingin snýr seg um at leggja um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, kvotur í sambandi við skipakeyp og kvotur til at styrkja um kvotugrundarlagið hjá fiskifari til egnar árskvotur. Broytingin ber í sær, at landsstýrismaðurin fyrisitingarliga kann gera av, at tillutað kvota kann verða løgd um til egnar árskvotur, áðrenn tilsagnartíðarskeiðið er runnið,

um mett verður, at grundarlag er fyri framhaldandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytir annars hava verið hildnar.

**Til nr. 24**
*§ 49 a*
Við hesi grein er lagt upp til, at landsstýrismaðurin fær heimild at loyva, at nøgdir av makreli, norðhavssild ella svartkjafti, sum í 2020 og 2021 eru latnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1 og 2, men ikki brúktar í 2021, kunnu flytast til 2022.

Eftir § 14 a, stk. 3 og § 15 b, stk. 3 í galdandi lóg kunnu nøgdirnar av makreli, norðhavssild ella svartkjafti, sum ikki vórðu brúktar til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020, men fluttar til 2021, bert gagnnýtast í 2021 og falla hareftir burtur. Hetta verður við uppskotinum broytt soleiðis, at nøgdir fluttar frá 2020, men ikki brúktar í 2021, ikki detta burtur, men ístaðin kunnu flytast til 2022 saman við óbrúktum nøgdum av tí, sum er sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021.

Yvirskipað er broytingin ætlað at stuðla undir, at teir fiskimøguleikar, landið letur, verða gagnnýttir. Endaligu niðurstøðurnar um kvoturnar til vinnuligar royndir og verkætlanir vórðu ikki gjørdar fyrr enn nú í september 2021. Væntast kann, at eftir at tilsøgn er givin um kvotu, skulu fyrireikingar gerast, áðrenn fiskiskapurin kann byrja. Og tá er helst so mikið útliðið á árið, at kvoturnar neyvan fara at verða fullnýttar í 2021.

Tilsagnarhavari kann bert flyta restkvotur til 2022, um treytirnar í tilsøgnini, fyri at fáa fiskiloyvið endurnýggjað, eru hildnar.

Í stk. 2 er ásett, at flutt kvota ikki er partur av føroysku kvotuni í 2022.

**Til nr. 25 og 26**
*§ 64, stk. 1*
Skotið verður upp at strika tilvísingina til § 5, stk. 2, tí ásetingin leggur heimildir til landsstýrismannin og inniheldur tí ikki viðurskifti, sum kunnu revsast. Somuleiðis verður tilvísingin til § 21, stk. 3 strikað, og er hetta ein fylgibroyting av broyting nr. 12, har skotið verður upp at strika § 21, stk. 3.

**Til nr. 27**
*§ 64, stk. 2*
Fylgibroyting av nr. 14 har skotið verður upp at strika § 22, stk. 3.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskimálaráðið, xx. oktober 2021

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: